TILFEINGIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, 23. februar 2026
J.nr. 26/04151

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

**Svar frá Eiriki í Jákupsstovu, landsstýrismanni, upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-089/2025 frá Honnu Jensen, løgtingskvinnu, um pass til føroysk ross**

*Spurningarnir vóru soljóðandi:*

1) *Hvussu gongur gongur við at útvega føroyska rossinum eitt pass, so at ross kunnu útflytast, og nær kann væntast, at komið er á mál?*
2) *Hvussu mong føroysk ross eru til í dag?*
3) *Hvørji átøk í ætlanini "Action Plan for the Conservation of the Faroese Horse", sum er í sjey punktum, eru sett í verk?*

*Svarað verður undir einum:*
Arbeiðið at útvega føroyskum rossum pass gongur væl, og kunngerð hesum viðvíkjandi er send til hoyringar í dag. Tá henda kunngerð er sett í gildi, ber til at útflyta føroysk ross treytað av, at myndugleikarnir í móttakaralondunum vilja taka ímóti teimum, sbr. niðanfyri.

Sendikvinna Føroya til ES hevur í longri tíð, vegna og saman við landsdjóralæknanum og Vinnumálaráðnum, verið í samráðingum við ES um at fáa útflutning av føroyskum rossum tiknan upp í veterineravtaluna við ES. Ilt er kortini at meta um, nær komið er á mál við hesum samráðingum.

Í dag eru umleið 90 føroyskt ross í Føroyum. Arbeitt verður við at varðveita rossaslagið, og tað arbeiðið stuðlar undir tað, sum er nevnt í *Action Plan for the Conservation of the Faroese Horse.* Skal samlaða ætlanin fyri føroyska rossið fremjast í verki, krevur hetta økta fígging, sum ikki er fingin til vegar.

Tilfeingis- og vinnumálaráðið, 23. februar 2026

**Eirikur í Jákupsstovu**
landsstýrismaður